STEYPA FINALUR

LEIKSKRÁ 2018

24. OG 25. FEBRUAR

Magnus Tausen
Formaður

So er tað nú!

So er størsta einstaka vikuskiftið hjá flogbóltinum endiliga komið aftur. Allar steypafinalurnar líka úr gentum og dreingjum 12 til Meistaradeildina hjá kvinnum og monnum verða leiktar. Umstøðurnar hava ongantíð verið betri, nú vit á fyrsta sinni kunnu brúka nýggju stórhøllina, sum Tórshavnar kommuna hevur latið byggja. Og aftur hesaferð kunnu vit skriva søgu.

Fer SÍ at skriva søgu?

Í steypakappingini kunnu feløgini hava tvey lið. Tað hevði SÍ hjá monnunum, har sera evnaríkir og royndir leikarar manna b-liðið, sum ikki gjørdi mætari enn at vinna sín bólk og hálvfinaluna, og nú stendur í sjálvari steypafinaluni. Tað er ikki gjørt áður, so aftur hesaferð kunnu vit siga, at søga kann verða skrivað. Tað skal tó nógv til, tí hinumegin netið er ÍF, sum seinastu mánaðirnar hevur blást alla mótstøðu av vøllinum. Seinast við greiðum 3–0 sigri í Klaksvík ímóti Mjølni. Við sigrinum er ÍF nýtt oddalið í landskappingini og má tí taka leiklutin á seg sum greiður favorittur í steypafinaluni hesaferð. Tað er bara líka tað, at roynda SÍ-liðið higartil hevur vunnið alt á sínum vegi í finaluna, og leikararnir hava roynt hetta mangan fyrr. Hava teir enn ein sigur í sær?

Dráttur alt at spæla fyri

Kvinnurnar í Drátti hava havt eitt misjavnt kappingarár. Serliga byrjanin var vánalig, men liðið hevur fótað sær væl seinastu umførini og vinnur seg alsamt longur og longur fram á stigatalvuni. Ósigurin ímóti KÍF seinasta leikumfar kann tó gerast dýrur í royndini at koma í FM-finaluna, so júst hesin dysturin er besta boðið hjá Drátti at vinna steyp hetta kappingarárið. Og tær hava vanliga gott tak á Fleyr, sum higartil í ár hevur staðið seg framúr væl. Hetta er ein dreymafinala, tí hvør minnist ikki FM-finaluna millum hesi bæði liðini fyri tveimum árum síðan, tá ið alt varð avgjørt í gullsettinum við minsta møguliga muni. Tá lá Fleyr omaná, men hvør dregur longra stráið hesaferð?

Tey ungu

Sum vant sleppa øll tey ungu eisini at spæla við bestu kørmum. Tað gera tey undir stórum trýsti frammanfyri stórari áskoðarafjøld. Hetta er í sjálvum sær stórt hjá teimum, men sæð í eini longri tilgongd, er hetta týdningarmikið stig inn á størri pallar, har fleiri av hesum ungu fara at umboða Føroyar á ungdómslandsliðum og kanska A-landsliðnum.

Frá okkum í nevndini í Flogbóltssambandi Føroya skal eg ynskja øllum liðunum til lukku við steypafinaluplássinum og takka kommunum og lýsarum, at tit skapa karmar kring landið og gera tað møguligt at skipa fyri tiltøkum sum hesum.

„So er tað nú tit" – góðan dyst!

Útgevari: Flogbóltssamband Føroya • Tel. 318 766 / 218 766 • fbf@fbf.fo • www.fbf.fo
Sniðgeving og umbróting: Sendistovan • www.sendistovan.fo
Prent: Føroyaprent

Annika Olsen
Borgarstjóri í Tórshavnar kommunu

Vælkomin í Tjóðhøll Føroya

Við nýggju umstøðunum í dupulthøllini á Hálsi kunnu stórar hendingar, so sum steypafinalur og aðrir stórir dystir, gerast til heilt aðrar upplivingar – bæði fyri spælarar og áskoðarar. Fyri viku síðani gjørdi hondbólturin tað upp á sín máta og nú ger flogbólturin tað upp á sín máta.

Í næstan tvey ár hevur verið arbeitt miðvíst fram ímóti at fáa dupulthøllina á Hálsi lidna, og er hetta ein liður í yvirskipaða málinum hjá Tórshavnar kommunu, sum er at styðja undir ítrótt í fremstu rød, so vit bæði tryggja úrvalsítrótti frægastu umstøður og skapa áhugaítróttinum bestu karmar, so okkurt gott er til øll.

Øll árini hevur høllin á Hálsi verið karmur um ítróttartiltøk av ymsum slagi, umframt at skúlar, frítíðarskúlar, samkomur og sjálvbodnir felagsskapir hava skipað fyri alskyns tiltøkum í høllini. Nú er høllin enn betri egnað til alt hetta, og eitt nú kunnu vit til konsertir hýsa ikki færri enn 3.000 áskoðarum, sum er nógv tað mesta undir einum taki her á landi. Ein av fleiri góðum orsøkum til, at vit nú rópa hana Tjóðhøll Føroya.

Fyri viku síðani gekk so endiliga sjón fyri søgn, hvørjir møguleikar liggja hjá ítróttinum í nýggju dupulthøllini, tá hondbólturin leygardagin og sunnudagin skipaði fyri sínum steypafinalum. Fyri jól samtykti býráðið nýggj sitipláss, soleiðis at tað nú við báðar endarnar á hondbóltsvøllinum og fram við aðrari síðuni ber til at hýsa ikki færri enn 1.500 áskoðarum í høllini.

Hondbólturin hevði stóra vøllin so langt yviri í nýggja partinum av høllinum, sum áskoðarapallurin gjørdi tað møguligt, men nú flogbólturin hevur gjørt seg út til sínar steypafinalur, er stóri vøllurin í eldra endanum á stóru høllini. Innan fyri eina viku kunnu vit tí uppliva somu høll upp á tveir ymiskar mátar og veruliga síggja, hvørjir møguleikar liggja í nýggju umstøðunum.

Enn sum áður koma vit eisini at uppliva steypafinalur við liðum úr mestsum øllum landinum, tí í teimum tilsamans 12 steypafinalunum hjá bæði teimum yngru og teimum vaksnu eigur SÍ tíggju lið, Fleyr sjey, Ternan trý, TB tvey og Dráttur og ÍF hvør sítt. Eins og hjá hondbóltinum eru báðir dagarnir steypafinaludagar burturav, so flogbóltsáhugað veruliga kunnu njóta góðar dystir og góða samveru í tjóðhøll okkara.

Sum borgarstjóri í Tórshavnar kommunu vil eg bjóða tykkum øllum at vera vælkomin at njóta tær umstøður, vit hava at bjóða. Eg ivist ikki í, at tit øll vilja kýta tykkum og gera tykkara besta, so tit skulu fáa tað besta burturúr, og vil eg ynskja tykkum øllum somlum bestu eydnu!

Eyðdis Hartmann Niclasen
Borgarstjóri í Vága kommunu

Bestu eydnu ynskja vit tykkum í Drátti

Við kvøðu úr Vága kommunu.

Okkara røsku kvinnur úr Drátti hava tryggjað sær annað plássið í steypafinaluni í flogbólti fyri kvinnur. Hesum eru vit øll í Vága kommunu sera errin av, tí vit føla flestøll, at vit eru partur av hesi sólskinssøgu.

Dráttur var stovnað av framskygdum fólkum, sum sóu eina styrki í, at Miðvágur og Sandavágur vóru felags um eitt flogbóltsfelag, tí fólkagrundarlagið tá bleiv munandi størri.

Nógvir av leikarum felagsins kennast eisini frá skúlanum, bæði sum næmingar og lærarar. Felagið og góðu úrslitini hjá felagnum bera prógv um eitt sera væleydnað og ríkt samstarv millum bygdirnar Miðvág og Sandavág, sum á náttúruligan hátt hevur blómað og vaksið seg størri og sterkari, sum árini eru liðin.

Samanhaldið í felagnum hevur verið serstakliga gott, og samstarvið í felagnum millum hesar gentur og kvinnur, ið nú hava vunnið sær rætt til at dystast í steypakappingini, hevur verið fyrimyndarligt.

Eg veit, at allir stuðlar, so sum vinfólk systkin, foreldur, familja og viðhaldsfólk yvirhøvur, fylgja kvinnunum tætt, og fara eisini at møta fjølment hettar vikuskiftið, at geva teimum dyggan stuðul til síðsta bríksl.

Leygarmorgunin á steypafinaludegnum verður felags morgunmatur fyri stuðlum og leikarum. Síðan verður farið til Havnar at hyggja eftir steypafinalunum. Um kvøldið verður skipað fyri móttøku fyri stuðlum og leikarum, óansæð úrslitið.

Vit vóna, at vit í ár fáa steypið vestur í Vága kommunu, og eg fari vegna býráðið og okkum øllum í kommununi at ynskja tykkum allarbestu eydnu. Eisini fari eg at takka tykkum leikarum og venjarum, fyri tykkara ágrýtni og áhaldni, sum dregur felagið fram móti væleydnaðum avrikum, sum tit kunnu verða sera errin av. Vit eru eisini errin av tykkum.

Koyrið á gentur, latið okkum vísa teimum!!!

VÁGA KOMMUNA – EIN KOMMUNA Í MENNING

VÁGA KOMMUNA SETUR TRIVNAÐ OG UMHVØRVI Í HÁSÆTI

VÁGA KOMMUNA

– ALTÍÐ VERD EINA VITJAN

- Kálvalíð
- Krígssavnið
- Kaminan í Vatnsoyrum
- Lakeside
- Sandavágs Kirkja
- Miðvágs Kirkja
- Minnisvarðin yvir Hammershaimb
- Minnisvarðin yvir Jens Paula Heinesen
- Minnisvarðin yvir Mikkjal á Ryggi
- Gøtan út til Trøllkonufingur
- Gongutúrur til Bøsdalafoss
- Gongutúrur til Fjallavatn
- Gongutúrur til Presttanga
- Gongutúrur til Slættanes

GISTAST KANN Á VALLARAHEIMINUM Á GILJANESI

Vága kommuna
Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur
Tel: (+298) 34 44 00
Fax: (+298) 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

VÁGA KOMMUNA

Aimé Jacobsen
Borgarstjóri í Sørvágs kommunu

Vit eru errin av tykkum

Hetta vikuskiftið er flogbólturin í miðdeplinum. Tær árligu steypafinalurnar, ið hava verið leiktar á hvørjum ári síðan ár 2000, eru aftur á skránni. Og hetta er ellinta árið á rað, at SÍ er umboðað í annaðhvørt báðum ella aðrari finaluni í bestu deildini.

Hetta er fjúrtanda steypafinalan hjá SÍ-monnum. Tað var longu heilt tíðliga, at teir tryggjaðu sær pláss í hesari steypafinaluni, tí felagið hevði tvey manslið í steypakappingini, og bæði klóraðu seg væl og spældu seg í semifinaluna. Tá ið teir spældu móti hvørjum øðrum í semifinaluni stutt síðan, vóru tað teir gomlu og royndu, ið sigraðu á okkara ungu framtíðarspælarum.

Tað eru sigursvand feløg, ið bresta saman í finaluni í dag. Bæði liðini hjá monnunum, SÍ og ÍF, eru oddafiskar, tá talan er um at vera við, og tað er nígginda ferðin, at tey møta hvørjum øðrum. ÍF er farið við flestu sigrunum, so á pappírinum vinna teir. Men vit ivast ikki í, at okkara leikarar fara at gera mótstøðu til síðsta bríksl.

Tað stendur væl til hjá SÍ-flogbólti. Neyvan nakrantíð áður hava tað verið so nógvir leikarar. Heili 25 lið eru við í kappingini í ár. Og minnast vit gallaveitsluna, ið var vestri í Vágum síðsta vár, so áttu vit ikki bert ársins verjuleikara, stjørnuskot og álopsleikara, men eisini ársins dómara.

Vit í Sørvágs kommunu kunnu av sonnum vera errin, tí SÍ er umboðað í tíggju av teimum 12 finalunum, ið verða leiktar hetta vikuskiftið. Tað er sera hugaligt at síggja, at tey nógvu yngru liðini klóra seg so framúr væl. Tað ber boð um, at tað miðvísa arbeiðið, sum leikarar, venjarar, foreldur og onnur, ið stíla fyri, gera, er til gagns fyri bæði felagsskapin og ítróttin. Tað sigur okkum eisini, at SÍ-flogbóltur setir kósina móti einari bjartari framtíð og fer helst framhaldandi at verða millum bestu liðini í landinum.

Vegna Sørvágs kommunu fari eg at takka Sørvágs ítróttarfelag fyri at umboða okkara kommunu so væl og virðiliga. Tit gera eitt framúrskarandi arbeiði fyri okkara børn og ungdóm!

At enda vil eg ynskja øllum finaluluttakarum til lukku við finaluplássunum. Eisini fari eg at nýta høvið at takka flogbóltssambandinum og fjølmiðlum fyri tykkara frálíka virksemi, ið ger steypafinalurnar so spennandi og áhugaverdar.



Sonni á Horni
Borgarstjóri í Fuglarfjarða kommunu

Koyrið á dreingir!

Mansliðið hjá ÍF Flogbólti hevur enn einaferð kvalifisera seg til at verða annað liðið í finaluni saman við SÍ úr Sørvági. Tykkum báðum liðunum verður ynskt hjartaliga til lukku við hesum avrikunum. Vónandi fáa vit aftur í ár ein góðan og spennandi dyst.

At leika í steypafinalu er ikki ein leiklutur, ið menninir hjá ÍF flogbólti eru óvanir við ella kenna lítið til. Sama kann sigast um mansliðið úr Sørvági. Steypafinalan 2018 er áttanda finalan ímillum ÍF Flogbólt og SÍ og tískil er talan eisini um tveir mastodontar innan mansflogbólt í nýggjari tíð.

Vit kunnu minnast aftur á nógvar góðar løtur, men serliga minnast vit steypafinaluna í 2013 millum júst ÍF og SÍ, sum gjørdist ein sannur gysari, ein finala, ið tók okkum øll á bóli við frálíkum spæli og djørvum leikarum.

Tað var í árinum 2000, at steypakappingin í flogbólti byrjaði, og hevur hon verið leikt á hvørjum ári síðani. Menninir hjá okkum eru hesuferð við í finaluni fyri 12. ferð, og hava teir vunnið átta finalur.

Tað verður spennandi, um tað nú fer at eydnast at vinna finaluna fyri níggindu ferð. Vit fuglfirðingar trúgva upp á tað, lat ongan ivi vera um tað.

Nú kan tað ljóða, sum at eg haldi tað verða eina sjálvfylgju, at vit eru í finaluni og kanska vænti, at vit vinna eisini, men so er ikki. Nei øll vita, at ítrótturin í Føroyum ídag er á einum sera seriøsum støði og krevur nógv av íðkarum, venjarum og øllum rundan um hesar, og tað er óansæð, hvør ítróttargreinin er.

Hetta er ikki minni galdandi, um ein ætlar at verða í fremstu rød. Og tað er júst tað, okkara menn gera í løtuni bæði í steypakappingini og í føroyameistarakappingini.

Vegna Fuglafjarðar býráð vil eg nýta høvi at takka tykkum í ÍF flogbólti, bæði kvinnum, monnum, og ungu leikarum í felagnum fyri tykkara jaligu og virðiligu umboðan av býi okkara. Vit frøðast um tykkara avrik og tykkara støðufesti í toppinum í føroyskum flogbólti.

Til seinast vil eg takka Flogbóltssambandi Føroya, Kringvarpi Føroya og Rás 2 fyri dygdargott arbeiði hvør á sínum øki, flogbólts-spælinum at frama, og vóna at vit fáa 2 góðar og gevandi steypafinalur.

Koyr á Ternan!

Jóhannus Danielsen
Borgarstjóri í Nes kommunu

Tað er stuttligt og hugaligt hjá okkum í Nes kommunu at fylgja við í steypafinalunum hjá yngstu liðunum í ár. Ternan er umboðað í 3 finalum, U14 gentum og hjá gentum og dreingjum í U12.

Tað er ikki av tilvild. Tey sum hava fylgt við flogbóltskappingunum kring Føroyar hetta kappingarárið hava lagt til merkis, at Ternan t.d. hevur verið best umboðað í U12 aldursbólkinum.

Eisini til venjingarnar, í fimleikarhøllini í Tofta skúla, er uppmøtingin sera góð. Flogbóltsfelagið Ternan ger eitt stórt ungdómsarbeiði, sum vit í Nes kommunu kunnu fegnast um og eru errin av. Ternan leggur stóran dent á at menna okkara ungu leikarar. Við ábyrgdarfullari leiðslu, góðum venjarum, røskum leikarum og stuðlandi foreldrum síggjast góð úrslit. Tað er hetta vikuskiftið eitt gott dømi um, har Ternan er umboðað í 3 finalum.

Flogbóltsamband Føroya (FBF) ger eisini eitt stórt arbeiði fyri at íbirta áhuga millum børnini til flogbóltsspælið og at menna yngru leikararnar. Tað, at Peter Morell er í starvi hjá FBF, hevur víst seg at verið ein sannur fongur fyri flogbóltin í Føroyum. Við sínum vitjanum úti í feløgunum, hækkar Peter Morell støðið á barnavenjingunum og eggjar børnum og venjarum at halda fram við at venja og menna seg. Flogbóltsamband Føroya og Peter Morell eiga stóra tøkk og rós uppiborið fyri teirra ungdómsmenningararbeiði úti í feløgunum, og ikki minst skúlunum, har Peter Morell eisini vitjar og skipar fyri venjingum.

Mótstøðuliðini hjá gentunum og dreingjunum er í øllum trimum førunum SÍ. Sørvágur er ein kend og sigursvand flogbóltsbygd. Av teimum 12 steypafinlunum í ár, er SÍ annað liðið í 10 av finalunum. Tílík úrslit koma ikki av sær sjálvum, men eru grundað á vælskipað og áhaldandi gott ungdómsarbeiði. Øll flogbóltsfeløg í Føroyum, eisini Ternan, kunnu óiva læra nógv av tí ungdómsarbeiði, sum verður gjørt hjá SÍ í Sørvági.

Um vit hyggja at fólkagrundarlagnum og umstøðum annars, so kunnu við staðfesta, at tað er rættuliga eins hjá Ternuni og SÍ. Um ársskifti búðu 1.279 fólk í Nes kommunu og 1.177 í Sørvágs kommunu. Hallirnar á Toftum og í Sørvági eru eins stórar. Sostatt eru fyritreytirnar nærum eins í báðum kommununum og vónandi fer góða ungdómsarbeiðið í Ternuni at halda fram, so Ternan eisini í framtíðini verður partur av flogbóltsfinalunum, bæði hjá børnum og vaksnum.

Vegna Nes kommunu fari eg at takka Ternuni fyri at umboða okkara kommunu so væl og virðiliga og ynskja gentum og dreingjum bestu eydnu í finalunum í dag.

Koyr á Ternan !

KREA



NES KOMMUNA
stuðlar ítróttina

NES KOMMUNA
Ein kommuna fyri øll

TRIVNAÐUR
ÁBYRGD OG ÁLIT
MENNING

Kristin Michelsen
Borgarstjóri í Tvøroyra kommunu

TB-flogbóltur er ein fyrimynd fyri flogbólt

Komandi vikuskiftið verður aftur skipað fyri finaludøgum í flogbólti, og er hetta 19. ferðin, ið Flogbóltsamband Føroya skipar fyri hesum finaludøgum fyri tey eldri og tey ungu. Hetta eiga tygur stóra tøkk fyri, at komandi vikuskiftið verður ognað flogbóltinum í Føroyum.

TB flogbóltur serliga á kvinnu og gentusíðuni hava gjøgnum mong ár verið ein fyrimynd fyri flogbólt og fyri Tvøroyri, og tað eru ogur ógvuliga fegin um á Tvøroyri.

Tíverri eyðnaðist ikki hjá meistaradeild kvinnum at spæla seg í finaluna í ár, ið tær vunnu í fjør, men tær kom í semfinaluna, men Tvøroyri hevur tvey lið í steypafinaluni, tað eru kvinnuunglingar og gentur 14 ár, so Tvøroyri er umboðað við tveimum liðum.

Seinni í ár verður Tvøroyrar kommuna vertur fyri FM kapping hjá teimum yngru deildununm, og vil Tvøroyar kommuna takka Flogbóltsambandi Føroya , fyri at teir aftur í ár hava valt Tvøroyri.

At enda vil Tvøroyar kommuna ynskja øllum teimum, ið hava spælt seg í steypafinalurnar, Flogbóltsambandi Føroya og øllum teimum, ið vara av flogbóltinum runt um landið, eitt gott flogbólts vikuskiftið, síggjast til FM í apríl.

TVØROYRAR KOMMUNA

STUÐLAR FLOGBÓLTINUM

Mynd: Turið V. í Dali

Tvøroyrar Kommuna ynskir TB-Flogbólti góða eydnu í finalunum

TVØROYRAR KOMMUNA

www.tvk.fo

SÍ MENN

Liðformaður:
Jón Nielsen

Venjari:
Jørgen Niclasen

Hjálparvenjari:
Kaj á Stongum

Liðleiðari:
Jákup av Kák

Høvuðstuðul:
Hiddenfjord, SP/F Mykines

Leikarar		Aldur	Hædd	Leikpláss	Landsdystir
1	Jón Falkvard	37	187	Miðja	20
3	Ólavur Jensen	33	174	Hevari	26
4	Jørgen Niclasen	49	175	Hevari	0
5	Jón Nielsen	37	191	Diagonalur	25
6	Jón Joensen	33	184	Kantur	32
7	Ingi Ole-Jacobsen	30	187	Miðja	4
8	Jóhan Petur á Stongum	32	176	Libero	71
9	Arngrím Thomasen	45	176	Libero	0
10	Eli Reynskor	26	193	Miðja	0
12	Martin Mikkelsen	26	194	Miðja	0
13	Emil Mikkelsen	28	187	Kantur	0
16	Bogi Kruse	36	184	Kantur	0

ÍF MENN

Liðformaður:
Bartal Eliasen

Venjari:
Boban Ilić

Scout:
Andreas Zachhau

Liðleiðari:
Lukasz Lipski

Høvuðsstuðul:
Havsbrún, Norðoya Sparikassi, North pelagic, Framherji, Waag, Pelagos

Leikarar		Aldur	Hædd	Leikpláss	Landsdystir
1	Teitur Eliasen	19	189	Miðja	0
2	Ingálvur Eyðunsson Olsen	19	192	Miðja	5
3	Meinhard L. Mohr	17	183	Miðja	0
4	Áslakur Holm	18	187	Hevari	0
6	Bartal Eliasen	41	189	Hevari	56
7	Eyðun Laksáfoss	30	196	Miðja	0
8	Hjortur Eliasen	19	189	Kantur	0
10	Bjarni Larsen	25	182	Libero	42
11	Bárður Jacobsen	25	189	Diagonalur	23
12	Tróndur Høgnason Hansen	20	190	Kantur	0
14	Trygvi Hansen	23	196	Kantur	32

FLEYR KVINNUR

Liðformaður:
Anna Sára Leivsdóttir Skaalum

Venjari:
Kristian Mikkelsen

Hjálparvenjari:
Hjalmar Joensen

Liðleiðari:
Anna Falkenberg

Fysioterapeut:
Klæmint Isaksen

Leikarar		Aldur	Hædd	Leikpláss	Landsdystir
1	Bjørk Nolsøe Isaksen	17	174	Kantur	0
3	Magnhild Jacobsen	21	171	Diagonalur	4
4	Barba Svabo Hansen	17	172	Miðja	0
5	Súsanna Sólrunardóttir Ludvig	20	182	Miðja	4
6	Anna Sára Leivsdóttir Skaalum	25	173	Kantur	8
7	Hilda Bolstad Mortensen	17	172	Kantur	0
8	Kristina Østerø Knudsen	19	169	Libero	0
9	Anja Sonnadóttir Danielsen	25	181	Kantur	42
10	Katrin Petersen	28	174	Miðja	12
11	Bára Holm Jacobsen	24	174	Diagonalur	3
12	Barbara Durhuus	15	177	Miðja	0
13	Inge Marie Rasmussen	28	157	Libero	4
15	Bettieyð Ellingsgaard	20	172	Kantur	0
16	Hanna Iansdóttir Biskupstø	15	163	Hevari	0

DRÁTTUR KVINNUR

Liðformaður:
Petra Sunadóttir Hansen

Venjari:
Elisabeth S. Rasmussen, Herborg á Mýruni

Høvuðsstuðul:
Thorfinn Nielsen, Sandavágs Timburhandil, Hiddenfjord, H-Dygd, SÓKN Advokatar, Eur-Express, Bónus, MagnKaffi, Sport 24

Leikarar		Aldur	Hædd	Leikpláss	Landsdystir
1	Joan Silvia Johannesen	19	171	Miðblokkur	0
2	Sesilia Johnsdóttir Prior	17	180	Miðblokkur	0
3	Elspa Suffía Joensen	37	178	Miðblokkur	5
4	Henrikka Vang Jacobsen	15	175	Kantur/diagonal	0
5	Petra Sunadóttir Hansen	18	181	Hevari	4
6	Ruth Albinsdóttir	28	168	Kantur	15
7	Jórun Døgg Jørgensen	15	173	Miðblokkur/diagona	0
8	Anna Sunadóttir Hansen	19	180	Kantur	10
9	Elin Akselsen	36	170	Diagonal	0
10	Herborg á Mýruni	38	172	Kantur/Hevari	10
12	Elsa Sandberg Nielsen	29	174	Kantur/diagonal	5
13	Barbara Herdalur Poulsen	20	167	Libro	0

GENTUR 14B

TERNAN	SÍ	LEYGARDAG **KL. 9.00**
1 Inger Elisabeth Hansen	1 Maria Magnussen	
6 Jórun Petersen	3 Tóta Búadóttir	
7 Susan Philbrow	4 Laura Skov Weihe	
12 Andrea Sumaganday	9 Fríða Haraldsen	
15 Maiken Jacobsen	11 Sofía Weihe Simonsen	
18 Laila Olsen	12 Anja Sólja Niclasen	
23 Astrið Petersen	13 Bára Jansdóttir	
29 Annika Hansen		

DREINGIR 17

SÍ	FLEYR	LEYGARDAG **KL. 10.00**
2 Ari í Haraldstovu Petersen	3 Tórður Gunnarsson Højsted	
5 Bjarni Joensen	4 Boas á Lakjuni	
6 Jón weihe Simonsen	5 Hørður Joensen	
7 Jógvan Kári Birgirson Lauritsen	6 Hákun Heinason	
8 Róar Egholm Anderson	7 Eyðfinn Rajani Færø	
9 Julian Vest Niclasen	8 Jónfinnur Hansen	
11 Oddur í Haraldstovu Petersen	9 Dávið Hentze	
12 Ragnar Weihe	10 Mattias Nolsøe Isaksen	
13 Tóki Joensen	17 Dan Eyðun Karbech Saxov	
14 Hjørtur Joensen	21 Jógvan Gøthe Magnusson	

DREINGIR 12

SÍ	TERNAN	LEYGARDAG **KL. 18.00**
1 Silas Poulsen	4 Harry Højgaard	
3 Brandur Reynstind	6 Jákup Nesá	
4 Tóki í Haraldstovu	6 Filip Hansen	
5 Atli Falkvard	10 Leroy Philbrow	
6 Mattias Falkvard	11 Heðin Djurhuus	
7 Einar Thorgrímsson	11 Róar Johansson	
9 Elias Petersen	13 Eli Hansen	
11 Róar í Haraldstovu	20 David Olsen	
	21 Magnus í Hjøllum	
	22 Hjarnar Johansen	
	23 Jósef Olsen	
	31 Hanus Højgaard	
	77 Svend Danielsen	

GENTUR 12

SÍ	TERNAN	SUNNUDAG **KL. 13.00**
2 Sára Kambsgarð	5 Maia Lamhauge	
3 Tóta Búadóttir	6 Rannvá Mikkelsen	
5 Lisa Harsaldsen	8 Selma Hansen	
6 Andreja Petrovic	13 Melanie Andreassen	
7 Marin av Trøð Lauritsen	15 Maiken Jacobsen	
8 Elin T. Poulsen	17 Elsa Hansen	
10 Elin Hovgaard	20 Amy við Rætt	
11 Sofía Weihe Simonsen	29 Annika Hansen	
12 Anja Sólja Niclasen		
13 Bára Jansdóttir		
14 Lilja Haraldsen		
15 Oda Eyð Lauritsen		
16 Laura Skov Weihe		

GENTUR 14A

SÍ	TB	SUNNUDAG **KL. 14.15**
1 Rannveig Rós Joensen	1 Ingrid Erhardsdóttir Müller	
2 Bjørk Poulsen	2 Johanna Christiansdóttir	
4 Janna Falkvard	3 Bjarta Hammer	
5 Malan Maria í Haraldstovu Weihe	4 Bjarta Sørensen	
6 Sólja Falkvard Gudmundsen	5 Vár Ólavsdóttir	
7 Marita Eyðunsdóttir Thorsvig	6 Eir Ólavsdóttir	
8 Hallgerð Tonysdóttir Haraldsen	7 Julia Jacobsen	
9 Sólfríð Poulsen	8 Petra av Rana	
10 Josefina Eliasdóttir	10 Rakul Kambsgarð	
	11 Nancy Einarsson	

GENTUR 16

FLEYR	SÍ	SUNNUDAG **KL. 15.30**
1 Hanna Iansdóttir Biskopstø	1 Rannveig Rós Joensen	
2 Rannvá Henriksen	3 Tóta Búadóttir	
3 Kezia Zachariassen	4 Janna Falkvard	
4 Vár Rajani Færø	5 Malan Maria í Haraldstovu Weihe	
5 Hildur Kyster Hanusardóttir	6 Turið Búadóttir	
6 Ester Haraldsen	7 Eva Gunn Niclasen	
7 Bjarta Jákupsdóttir	8 Inga Helena Henriksen	
8 Maria Gøthe Magnusdóttir	9 Sólfríð Poulsen	
9 Bjørg Jensen	10 Josefina Eliasdóttir	
10 Sára Rannváardóttir Vatnhamar	11 Sofía Weihe Simonsen	
11 Barbara Káradóttir Durhuus	12 Anja Sólja Niclasen	
12 Ró Dahl Jacobsen	15 Rannvá Kambsgarð	
	17 Marita Eyðunsdóttir Thorsvig	
	18 Hallgerð Tonysdóttir Haraldsen	

KVINNU-UNGLINGAR

TB	FLEYR	SUNNUDAG **KL. 16.45**
1 Sófía-Maria Ferjá	1 Bjørk Nolsøe Isaksen	
2 Sofía Berg í Heiðinum	3 Magnhild Jacobsen	
3 Silja Pálsdóttir Augustinussen	4 Barba Svabo Hansen	
4 Johanna Christiansdóttir	5 Súsanna Ludvig	
5 Brynhild Hofgaard	6 Sára Rannváardóttir Vatnhamar	
6 Teresa Jóhannesdóttir Magnussen	7 Hilda Bolstad Mortensen	
7 Jónhild Midjord Nybo	8 Kristina Knudsen	
8 Rebekka Nielsen	9 Anna Falkenberg	
9 Linda Sørensen	10 Anna Gøthe Magnusdóttir	
11 Sharon Haynes	11 Rannvá Henriksen	
12 Halldis Michelsen	12 Barbara Durhuus	
13 Sára-Maria Johannesen	13 Maria Gøthe Magnusdóttir	
14 Nancy Einarson	15 Bettieyð Ellingsgaard	
15 Julia Naomi Mortensen	16 Hanna Iansdóttir Biskupstø	

DREINGIR 15

SÍ	FLEYR	SUNNUDAG **KL. 18.00**
1 Silas Poulsen	4 Boas á Lakjuni	
2 Elias Petersen	5 Hørður Joensen	
3 Ari í Haraldstovu Petersen	7 Eyðfinn Rajani Færø	
4 Tóki í Haraldstovu	9 Tórur Paulason	
6 Einar Thorgrímsson	10 Mattias Nolsøe Isaksen	
7 Jógvan Kári Birgirson Lauritsen	17 Dan Eyðun Karbech Saxov	
8 Róar Egholm Anderson	21 Jógvan Gøthe Magnusson	
10 Atli Falkvard		
11 Bjarni Joensen		
14 Hjørtur Joensen		

GENTUR 19

SÍ	FLEYR	SUNNUDAG **KL. 19.15**
1 Josefina Eliasdóttir	1 Bjørk Nolsøe Isaksen	
2 Turið Búadóttir	2 Hildur Kyster Hanusardóttir	
3 Eyðvør Tórbjarnardóttir Poulsen	3 Bjarta Jákupsdóttir	
4 Mona Sunnvudóttir Poulsen	4 Barba Svabo Hansen	
5 Maria Sarita Lorentzen	6 Sára Rannváardóttir Vatnhamar	
6 Sissal Ellefsdóttir	7 Hilda Bolstad Mortensen	
7 Inga Helena Henriksen	8 Kristina Knudsen	
8 Katla Henriksen	9 Vár Rajani Færø	
9 Janna Falkvard	10 Anna Gøthe Magnusdóttir	
10 Eva Gunn Niclasen	11 Rannvá Henriksen	
11 Jórunn Elisdóttir Wang	12 Barbara Káradóttir Durhuus	
12 Malan Maria í Haraldstovu Weihe	13 Maria Gøthe Magnusdóttir	
	15 Bettieyð Ellingsgaard	
	16 Hanna Iansdóttir Biskopstø	

MANS-UNGLINGAR

FLEYR	SÍ	SUNNUDAG **KL. 20.15**
2 Hans Sejer Tummasarson	1 Oskar í Haraldstovu weihe	
3 Tórður Gunnarsson Højsted	2 Ari í Haraldstovu Petersen	
6 Hákun Heinason	3 Oddur í Haraldstovu Petersen	
7 Niels Niclasen	6 Teitur Anderson	
8 Jónfinnur Hansen	7 Jógvan Kári Birgirson Lauritsen	
9 Dávið Hentze	8 Jákup Martin Weihe	
17 Sjúrður Jensen	9 Julian Vest Niclasen	
18 Uni Jacobsen	11 Jón weihe Simonsen	
	12 Ragnar Weihe	
	13 Tóki Joensen	
	14 Hjørtur Joensen	

STEYPAVINNARAR
UNDANFARIN ÁR

MENN		
2017	Fleyr – SÍ	3-1
2016	ÍF – SÍ	3-0
2015	SÍ – ÍF	3-2
2014	ÍF – SÍ	3-0
2013	ÍF – SÍ	3-2
2012	SÍ – Mjølnir	3-0
2011	ÍF – Mjølnir	3-2
2010	SÍ – Mjølnir	3-1
2009	ÍF – SÍ	3-1
2008	SÍ – Mjølnir	3-1
2007	Mjølnir – ÍF	3-0
2006	Fleyr – Mjølnir	0-3
2005	SÍ – Mjølnir	3-0
2004	SÍ – ÍF	0-3
2003	SÍ – ÍF	2-3
2002	SÍ – ÍF	3-0
2001	ÍF – Mjølnir	3-0
2000*	Fleyr – Mjølnir	1-2

KVINNUR		
2017	KÍF – TB	1-3
2016	Fleyr – SÍ	3-0
2015	Dráttur – TB	3-2
2014	Mjølnir – Fleyr	3-0
2013	Mjølnir – SÍ	3-1
2012	Mjølnir – SÍ	3-1
2011	Mjølnir – SÍ	3-2
2010	SÍ – Dráttur	3-2
2009	SÍ – Fleyr	3-1
2008	SÍ – ÍF	0-3
2007	Dráttur – KÍF	3-2
2006	TB – ÍF	3-1
2005	Mjølnir – TB	3-1
2004	TB – Dráttur	3-1
2003	TB – ÍF	3-1
2002	TB – Mjølnir	3-1
2001	Mjølnir – Dráttur	3-2
2000*	Dráttur – Mjølnir	0-2

*Í fyrstu steypafinalunum í ár 2000 varð leikt við „Nordic Score“ stigaskipanini. – Sí niðanfyri!

NORÐURLENDSK STIGASKIPAN – NORDIC SCORE

Í ár 2000 var í Norðurlondum eksperimenteað við einari serligari norðurlendskari stigaskipan, men henda var kortini skjótt slept aftur.

Spælt var í hálvleikum, og tað liðið sum fyrst vann tveir hálvleikir, vann dystin. Um liðini vunnu hvør sín hálvleik, so var dysturin avgjørdur við einum javnbrótara, sum gekk upp í 15.

Í hvørjum hálvleiki galt um at vinna tvey sett. Hvørt settið gekk upp í 21. Tann sum so fyrst vann tvey sett, hevði tá vunnið ein hálvleik. Men um liðini vunnu hvør sítt sett, so var hálvleikurin avgjørdur við einum javnbrótara, sum einans gekk upp í 7!

Innviklað? Tja... kanska tað ikki var so løgið, at henda skipanin ikki vann frama.

HAVNAR FYSIOTERAPI
Certified McKenzie Clinic

Ítróttar- og ryggklinikkin
Tlf. 312 131
fysioterapi@fysioterapi.fo
www.fysioterapi.fo

Flogbørn – størsta verkætlanin nakrantíð

Í samstarvi við Evropeisku Flogbóltssamgonguna CEV og Volleyball Danmark hevur Flogbóltssambandið seinastu tvey árini lagt stóran dent á verkætlanina Flogbørn. Fyri okkum er hetta størsta einstaka átakið nakrantíð, og vit settu okkum fyri, at úrslitini skuldu síggjast beinanveg og framyvir. Tí hava vit lagt okkum eftir bæði at venda okkum til feløgini og til skúlarnar í Føroyum.

„Hesi tvey kappingarárini, verkætlanin hevur verið, hava vit verið úti á nærum øllum skúlum í Føroyum og havt undirvísingargongdir“, sigur verkætlanarleiðarin Peter Morell.

„Málbólkurin hevur serliga verið 2., 3. og 4. flokkur, og vit hava verið ómetaliga væl móttikin bæði millum børnini og lærararnar“. Ein grundleggjandi táttur í arbeiðinum í skúlunum hevur verið at skipa fyri skúlakappingum. Tá hittast skúlarnir í økinum, og øll liðini úr ymisku flokkunum kappast í 3 tímar fyri at vinna steyp og heiðursmerki, sum vísa, at flokkurin er tann besti í Flogbørum í økinum.

„Umframt at næmingarnir ígjøgnum undirvísingargongdirnar hava nakað at gleða seg til, er tað eisini deiligt at síggja næmingar og lærarar frá ymisku skúlunum hittast, hugna sær og hava ein góðan dag saman“ sigur Peter Morell og heldur fram „vit hava seinastu vikurnar havt eina stóra undirvísingargongd fyri 6 skúlar kring Skálafjørðin. Endabresturin var ein skúlakapping fyri 200 næmingar úr 3. og 4. flokki. Ein framúr góð kapping við nógvum glaðum børnum og lærarum“.

Hetta skúlaárið koma Flogbørn út á 25 ymiskar skúlar og tað verða 12 skúlakappingar fyriskipaðar fyri tilsamans 1.700 børnum, sum øll hava verið ígjøgnum eina undirvísingargongd áðrenn kappingina.

Ein annar týdningarmikil partur í Flogbørnum er arbeiða saman við feløgunum og stuðla tí stóra arbeiði, sum tey gera kring landið. Her hevur tað frá Flogbóltssambandinum verið lagdur stórur dentur á, at Peter Morell og Anne Frederiksen koma út og geva íblástur og fakliga vegleiðing til teir nógvu sjálvbodnu venjararnar í Flogbørnum.

„Hesi skjótt 2 árini verkætlanin hevur koyrt í Føroyum síggja vit stóra framgongd í venjingunum og hjá børnunum og hvussu nógv miðvísari venjararnir eru í Flogbørnum. Fakliga og tekniska stigið er hækkað heilt nógv, og tað boðar frá góðum fyri menningini hjá flogbólti í Føroyum“, sigur Peter Morell at enda.

Verkætlanin „Flogbørn“ heldur fram til í apríl í 2019, so heilt nógv børn, lærarar og venjarar úti í feløgunum kunnu gleða seg til enn eitt ár við menning og íblástri har tey fáa gleði av verkætlanini „Flogbørn“.

Ungdóms- & lestrarferðaseðilin

Sveiggja aftur og fram fyri lágprís

Sveiggj™

Ert tú 25 ár ella yngri ella fulltíðarlesandi, kanst tú sveiggja aftur og fram við Atlantic Airways - lætt og ómakaleyst fyri lágprís.

Sveiggj-ferðaseðlar eru til taks á øllum Danmarkar- og NORÐ-leiðunum hjá Atlantic Airways.

Sveiggj-ferðaseðil kann keypast til stutt undan fráferð, men útboðið kann verða avmarkað á útvaldum fráferðum. Stovna tær ein vanga og bílegg Sveiggj-ferðaseðilin á www.atlantic.fo.

Atlantic Airways Vagar Airport 380 Sørvágur Tel 34 10 00 www.atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS